## DAGSINS MEINING

# Bush ein ólukka fyri heimin

Leygardagin varð George Bush, yngri tikin í eið sum nýggjur forseti í USA. Hann tekur við hesum so týðandi starvi eftir eitt sera ivasamt valúrslit. Fyri framman eru fýra ár við einum sera høgravendum forseta, sum í mongum førum setir til viks mannarættindi og virði, sum vit í vesturheiminum annars meta sera høgt. Tað er tí ein ólukka fyri bæði USA og restina av heiminum.

Gud náði amerikanarar, nú Bush hevur tikið sæti í Washington. Her verður hugsað um meiniga mannin, um tað fátækradømi og sosiala og annað órættvísi, sum fer fram í amerikanska samfelagnum. Og Gud nái umheimin, nú Bush eftir øllum at døma fer at leggja brenni á bálið til enn eitt kalt kríggj við síni stjørnukrígsætlan.

Bush hevur sett ráðharrar, sum eru so langt til høgru, at hetta kann koma at hava álvarsligar avleiðingar. Eitt nú stendur løgmálaráðharrin fyri so víðgongdum høgravendum sjónarmiðjum, at stórir partar av amerikanska samfelagnum mótmæla og ávara. Hesin ráðharrin er kendur fyri støðu sína móti tí abortlóggávu, sum finst í USA, hann er fyri fullkomnari fríari vápnasølu og tí har fylgir, hann er ímóti teimum, sum stríðast fyri einum betri umhvørvi osfr. Sjálvur heldur Bush eisini lítið um umhvørvisfólk og ljóðar tað, at hansara næstu umhvørvisráðgevar eru stóru oljufeløgini.

Ístaðin fyri at fáa eitt rættvísari og betri land fyri øll fer Bush at brúka allar midlar til at gagna teimum fáu og teimum, sum frammanundan eru múgvandi. Skattalætti fer at gera tað ómøguligt at byggja upp eina meira rættvísa undirvísingarskipan og eina sosiala trygdarskipan fyri øll.

Fyri ikki at tosa um mannarættindi. Bush verður nevndur sum bøðilin, ið gjørdist forseti. Sum guvernørur í Texas hevur hann verið við til at taka umleið 150 fólk av døgum. Í ongum føri, har biðið hevur verið um at fáa sakir útsettar ella uppafturtiknar, tí ivi var um próvtilfarið - hevur Bush játtað hetta. Kalt og kyniskt hevur hann víst øllum slíkum aftur. Og meðan aðrir statir í USA eru farnir at seta spurnartekin við allar deyðadómarnar og eru komnir eftir, at 7. hvør deyðadømdur er órættvíst dømdur ella hevur ikki fingið neyðugu hjálpina at verja seg, so hevur gongdin undir Bush verið tann øvugta. Har aðrir statir hava góðtikið DNA-royndir sum part av próvtilfarinum og har hetta í fleiri førum hevur frídømt fólk, sum eru dømd til deyðis uppá skeivt grundarlag, har hevur Bush sagt kortanei til at loyva DNA-royndir. Alt peikar tann eina vegin, at vit her hava fingið ein stívrendan og harðrendan forseta, sum heldur enn at virða vanlig mannarættindi ger tað øvugta. At hesin maður verður hann, sum fer at útnevna 2 - 3 nýggjar dómarar í Hægstarætti komandi árini er kanska tað mest ræðandi, tí við at seta høgravendar dómarar verða øll mannavirði, sum nútíðar humanistiska, solidariska og sosialt medvitandi samfelagið sær fram til, kveistrað til viks.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

# Thomas Thomassen, farin

20. januar andaðist Thomas Thomasen, fyrrv. stjóri á Tryggingarsambandinum Føroyar 91 ára gamal. Hann var føddur í Sandavági 5. august 1909 og kom á ungum árum á sorinskrivarakantórið í Havn og har starvaðist hann, til hann í 1948 var kosin stjóri á Tryggingarsambandinum, og í hesum starvi var hann til hann í 1978 var eftirløntur.

Tummas var giftur Jonu úr Vátutoft í Klaksvík, tveir vóru dreingirnir, Christoffer og Marius. Tey búðu á Abbatrøð. Jona doyði í 1984.

Tummas var virkin maður, og undir hansara leiðslu vaks Tryggingarsambandið til týðandi meginstovn fyri samfelagið. Tummas var ofta at síggja í báti, var tíðum á floti, og var grind, so var hann millum teir fremstu, snarur og vísur í øllum lutum. Millum gongumenn var hann ikki aftastur, tá teir fóru sínar føstu



leiðir sunnumorgnar.

Sennu árini var Tummas á sambýlinum á Vegnum Langa, sporini vóru farin at tyngjast, og ikki minni var tað honum ein stór sorg, tá sonurin, Marius, sum var eftirmaður hansara á tryggingi andaðist í 1988, og nú í heyst doyði sonarkonan, Katrin.

**jl.**

# Bernhard Henriksen 90 ár

22. januar fylti Bernhard Henriksen í Sandavági 90 ár.

Sum hjá so mongum unglingi tá fór Bernhard til skips, og sigldi hann við Sandavágssluppum - eisini undir krígnum. Seinni eisini við svági sínum, Johan í Hoyvík.

Bernhard fór seinni í land, og sum tann hegnismaður, hann er, lá fyri hjá honum at smíða.

Louisa, ættað úr Miðvági, og Bernhard settu búgv í heimbygd hansara - og har var fjálga tilhaldið



hjá fýra børnum teirra. Tá Louisa doyði fyri nøkrum árum síðani, fór Bernhard til dóttrina, Hjalmu og versonin, Andreas, at vera.

Í 60'unum var nógv byggiarbeiði í Havnini, men á bygd nærum einki. Tá fór Bernhard at smiðja hjá byggifyritøkun i Lamhauge & Waagstein - rímuliga gjørdist hann eisini álitismaður har. Tá pensjónsaldurin nærkaðist, fluttu tey aftur til heimbygdina.

Álit var í Bernhardi, har hann var. Soleiðis eisini í felagsarbeiði. Tá losjan »Vakhús« í Sandavági varð stovnað í 1931, var Bernhard ein av stovnarunum - og hann hevur verið hollur talsmaður fyri fráhaldsrørsluna - íðin og nærlagdur, tey mongu árini vóru Bernhard og losjan eitt.

Góður er hann við kirkjuna, har sært tú hann tíðum - og góðveðursdagar kanst tú síggja Bernhard koma eftir vegnum, heim eftir Valloyruni ella á beinkin við Fløttuoyruni - og kanska viðhvørt heimi á Neystum, og væl dámar honum eitt prát.

**jl.**

---

†

Tað verður kunngjørt, at kæra mamma, omma, langomma og vermamma okkara

**Margretha S. Sigurðsson**

andaðist mánamorgunin 22.01. 2001 í Klaksvík
Farið verður úr kapellinum mikudagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni hósdagin kl. 13

*Fyri tey avvarðandi*
**Jóin**

Tey, ið ætla at minnast Margrethu við eina blómuheilsan ella kransi, kunnu í staðin senda eina gávu til Norðoya Røktarheim.

---

†

Kæri sonur og bróðir okkara

**Ingi**

andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 20. januar, 48 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið 23. januar kl. 19 heim í Ebenezer.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin 24. januar kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elsa og Ingálvur av Reyni**

---

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



Náttúran egna oljuvernd

# Náttúran basir sjálv oljuvanlukkum

OLJUDÁLKING
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Oljudálking gongur serliga útyvir fuglin. Men ein oljuvanlukka er ikki ein endalig vanlukka, har skaðin ikki bøtist aftur. Stórar oljudálkingar seinastu árini hava sýnt, at lívið í náttúruni kemur fyri seg aftur. Men hetta skal ikki skiljast soleiðis, at oljudálking er vandaleys, hon fer tó nógv verri við fugli enn súgdjórum. Sjóleyvurnar sum vit síggja frá Galapagos í hesum døgum skulu nokk klára seg, sigur lívfrøðingurin Arne Nørrevang, sum fyri 10 árum síðan vitjaði Galapagosoyggjarnar saman við einum føroyskum ferðalagi.

– Oljudálking er ikki tann stóra hóttanin, sum fjølmiðlarnir mangan gera hana til. Náttúran megnar sjálv at koma á føtur aftur. Við Galapagosoyggjarnar



*Arne Nørrevang sigur, at náttúran er sera dugnalig at niðurbróta oljudálking*

er avlandsvindur í løtuni og hetta merkir at oljan frá strandaða skipinum spjaðist. Tey løttu evnini í oljuni fara upp í luftina sum bensinosi og tey tyngru fara at søkka sum frálíður. Men hendir ein stór oljudálking á einum avmarkaðum øki, og fer at reka móti landi, so kann skaði henda. Tað er serligfa fuglalívið oljan ger seg inn á. Fjøðurhamurin tolir ikki oljuna og hann gerst ótættur. Her norðuri hjá okkum merkir hetta, at fuglurin doyr av kulda. Men skaðin er ikki størri enn so, enn at hann rættast aftur eftir nøkur ár, sigur Arne Nørrevang. lívfrøðingur.

### Altíð olja í sjónum

Olja er altíð í sjónum og tað hevur hon verið frá araldstíð. Olja er í fiski, olja er í æti og olja lekur úr undirgrundini. Náttúran er tilbúgvin at taka í móti olju. So langt aftur, sum í 1550 legði ein norskur granskari merki til stóra oljudálking í Norðsjónum. Hetta var olja, sum var likin burtur úr undirgrundini. Flogfør, sum hava gjørt yvirlitsflúgvingar yvir føroyskum sjóøki, hava eisini avmynda olju, sum ikki stavar frá fólki, men er likin úr undirgrudini, sigur Arne Nørrevang.

– Í náttúruni finnst ein bakteria, sum livir av olju, er nógv olja í sjónum og nørist hendan bakteria og niðurbrýtur oljuna, sigur Arne Nørrevang.

– Hyggja vit eftir stórum oljuvanlukkum seinastu árini, eitt nú tann stóra í Prince Williams Sound í Alaska, so hevur náttúran megnað at koma fyri seg aftur. Tað einasta sum ikki er akkurát sum tað var, er gróðurin undir sjóvarmálanum. Tað tekur eitt sindur longur tið, áðrenn hetta kemur heilt í rættlag.

Aren Nørrevang sigur, at tað hjálpir lítið at vaska oljudálkaðan fugl. einasti mátin at fjørðurhamurin kann gerast í ordan aftur, er at fuglurin fær nýggjar fjarðar.

– Kemiskt at niðurbróta olju gevur heldur ikki góð úrslit. Hetta eru menn næstan hildnir uppat við í dag, tí hjáárinini á náttúruna eru ov stór. sigur Arne Nørrevang.

---




# Fakta um Galapagos

*John Johannessen*
*Kelda: DR*

Galapagos oyggjar liggja úti í Stillahavinum, vestan fyri Ekvador í Suðuramerika. Talan er um 19 oyggjar, ið eru skaptar av eldgosum. 13 teirra eru størri oyggjar, meðan 6 eru smærri. Oyggjarnar fevna um 50 túsund kvadratkilometrar av Stillahavinum.

Eingi upprunafólk eru á Galapagos. Thomas de Berlanga, biskupur í Panama, uppdagaði oyggjarnar av tilvild í 1535. Fyrstu ferð oyggjarnar vóru teknaðar á sjókort var í 1570.

Í 1700- og 1800- talinum nýttu sjórænarar oyggjarnar sum skjól og spísikamar. Her fingu teir feskt vant og skjaldbøkur, sum teir tóku við umborð á skipini og grillaðu, tá teir gjørdust svangir.

Í 1835 kom Darwin til Galapagos at kanna serliga plantu- og djóralívið, sum ikki finst aðrastaðni í heiminum. Listi hansara yvir spennandi djórasløg fevnir millum annað um albatrossar, pingvinir, havskjaldbøkur, iguanur, hvalir og delfinur. Eftir drúgt og gjølligt kanningararbeiði gav Darwin út kendu frágreiðingina um uppruna ættarinnar.

Galapagos oyggjar komu undir Ekvador í 1832, og smáar bygdir mentust á fleiri av teimum stóru oyggjunum. Flestu av núverandi íbúgvunum eru úr Ekvador, og eru hetta fólk, sum eru flutt hagar seinastu 40 árini. Fólkatalið veksur við 8 prosentum um árið.

Í 1859 vórðu oyggjarnar lýstar at vera tjóðarpark, orsakað av vaksandi ferðavinnuni. Í dag kostar tað umleið 100 amerikanskar dollarar at koma í lanbd á Galapagos.

---

# Fróðskaparsetrið fær oljupening

**Týsmorgunin skrivaðu Náttúruvísindadeildin á Fróðskaparsetrinum og Statoil-bólkurin í Føroyum undir eina fíggingaravtalu, sum ber í sær, at deildin fær 5,3 milliónir krónur tey næstu fýra árini. Hetta verður neyvan seinastu ferð, at oljufeløg gera slíkar fíggingaravtalur**

ÚTBÚGVING
*Stefan í Skorini*



*John Inderhaug og Hans Pauli Joensen eru báðir væl nøgdir við fíggingaravtaluna. Náttúruvísindadeildin fær 5,3 milliónir krónur frá Statoil-bólkinum, har meginparturin skal nýtast til granskingarverkætlanir, sum oljufeløgini kunnu brúka úrslitini av*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað er nú av álvara farið at merkjast, at oljufeløgini hava stórar ætlanir í Føroyum, nú Náttúruvísindadeildin og Statoil-bólkurin eru komin ásamt um samstarv.

Týsmorgunin undirskrivaðu John Inderhaug, økisleiðari hjá Statoil í Føroyum, og Hans Pauli Joensen frá Náttúruvísindadeildini fíggingaravtaluna.

Statoil hevur í avtaluni bundið seg at lata tilsamans 5,3 milliónir krónur yvir tey næstu fýra árini.

Báðir løgdu teir dent á, at hetta er ein avtala, sum verður báðum pørtunum at frama, tí báðir partar hava felags áhugamál á fleiri økjum, og tí er eitt samstarv ríkandi báðumegin borðið.

– Fróðskaparsetrið eigur at fyrireika seg tíðliga uppá oljuvinnuna, tí vit skulu hava fólk klár, tá oljuvinnan av álvara fer í gongd, sigur Hans Pauli Joensen.

Peningurin er oyramerktur til tríggjar heilt serligar verkætlanir, sum allar hava eitt ávíst samband við frálandavinnuna. Eisini verður peningurin nýttur til útbúgving av oljuverkfrøðingum, og ein partur fer til at seta ein professara í hálvtíðar starv.

Umframt Statoil eru Enterprise, Phillips og Veba við í Statoil-bólkinum.

– Tá vit koma til eitt land, har eingin oljuvinna er frammanundan, er tað vanligt, at vit royna at seta nakað í gongd, sum vit eisini kunnu fáa ágóðan av, sigur John Inderhaug.

### Lá í kortunum

Tá oljufeløgini søktu um loyvi at bora í føroysku undirgrundini lá tað í kortunum, at tey skuldu lata pening til útbúgving og líknandi í Føroyum. Náttúruvísindadeildin søkti tá um fígging, og tað eydnaðist at fáa eina avtalu við Statoil.

900.000 krónur fara til útbúgvingina oljuverkfrøði, har teir fyrstu seks studentarnir byrjaðu í 1998. Henda útbúgvingin tekur hálvtriðja ár, og teir fyrstu vera klárir um ársskiftið. Statoil hevur fyrr latið pening til hesa útbúgvingina.

Tær tríggjar granskingarverkætlanirnar, sum æva allar samband við frálandavinnu, og teimum verður flest peningur latin.

Verkætlaninar eita "seismiskir signalviðgerðahættir", "mekaniskir egiunleikar hjá basalti" og "operativt aldumodel fyri Føroyaleiðina".

Góðar fýra milliónir skulu nýtast at fíggja hesar verkætlanir. Granskingarúrslitið, sum funnið verður fram til í verkætlanunum, fer Statoil at nýta, tá klárt verður at bora í undirgrundini.

Hesar verkætlanirnar skulu vera við til at menna førleikan hjá oljufeløgunum, so tey eru betri fyri at fara undir boringina. Úrslitini fara at geva teimum størri vitan um seismisku mátingarnar í føroyskum øki og betri møguleikar fyri at tulka, hvat goymir seg undir føroyska basaltinum.